# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

†

**Petrina Ziskasen**
úr Klaksvík
(vanliga nevnd Dinna)

andaðist á Norðoya Røktarheimi 19. desember, 79 ára gomul.
Kistan fer úr kapellinum mánakvøldið kl. 18.00.
Jarðarferðin verður úr Betesda týsdagin kl. 13.00.

**Jórun, Lis og Jan**

Tey, ið ynskja lata blómur ella krans, kunnu í staðin geva Zarepta eina peningagávu, konta í peningastovnunum.

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at góða mamma, vermamma, omma og langomma

**Salmona Christiansen**
Leirvík

andaðist leygarmorgunin 19. desember á eldrasambýlinum Giljagarði, 86 ára gomul.
Jarðarferðin verður úr Leirvíkar kirkju týsdagin kl. 13.

*Familjunnar vegna*
**Erika, Christian Oluf og Henry**

Tey, ið ynskja at minnast Salmonu, kunnu lata eina gávu til Missiónshúsið í Leirvík, konto í Føroya Banka.

## Prógv

Uni Lamhauge, Lambareiði, hevur lokið maskinmeistaraútbúgving sum "Professionsbachelor í maritim og maskinteknisk ledelse og drift" tann 13. november 2009 á Fredericia Maskinmesterskole.

# Hans Jørgen Dam í Sandavági



Trupulleikin við deyðanum er, at vit sum oftast taka frástøðu frá honum. Liggur onkur lágt og er illa sjúkur, so skilja vit tað helst. Men hesa ferð var einki, ið bendi á nakað sovorðið.

At frætta, at Hans Jørgen hevði fingið óbótaligan løst yviri í Florida og ikki stóð til at bjarga, kendist sum nakað, ið ikki kundi passa. Gløggi og skemtiligi vágamaðurin, ið tók á seg so nógvar skyldur og avbjóðingar í Norðuratlantshavi og í uttanlandasigling, hevði fingið eitt eirindarleyst høgg í einum heilt øðrum heimsparti. Tað átti ikki at verið so, nú lívlanga tænastan beyð honum eina friðfulla eftirløn í heimbygdini.

Kendi helst Hans Jørgen frá barnsbeini av í longu og mjáu gøtuni í Sandavági. Okkum dámdu væl at práta, - aldursmunurin var nakað stórur, men tað bilti ikki stórvegis. Hans Jørgen fortaldi mær, hvørjir sandavágsmenn høvdu slitið sínar tufflur og gummiskógvar í "strætinum", og ein farri av skemti og góðsku lá eftirá. Hann nevndi teir við navni og visti um teirra serleikar og dygdir, og vit fingu um endan av eini farnari tíð.

Tá Venus úr Sandavági skal avstað á línuveiðu, beint sum vit eru í áseyðaroyting og eisini hoyggja í 1988, verði eg onkunsvegna púra óroyndur og av tilvild tikin við mín fyrsta túr til skips. Tað var so avgjørt ikki nakað, eg hevði ætlað mær, men tað vóru onnur, ið hildu, at eg átti at royna meg umborð á einum línubáti. Illsinnabitin var sjónskur, tá eg varð fylgdur umborð. Har vóru við Ásbjørn, Kristian og Eyðstein hjá Gerdu. Tað var kanska ikki verri, tí teir vórðu eisini tiknir við uttan at hava biðið um tað. Kortini strikaðist illsinnabitin út, tá eg hitti Hans Jørgen umborð á Venus. Hann skuldi við og dugdi at taka meg og kyrra ein treiskan og tvøran tannáring úr Havn. Vit komu tó skjótt á lagið og kendu eitt serligt og gott samljóð beinavegin,

Mín tíð umborð á Venusi gjørdist drúgvari enn væntað. Hví hon gjørdist tað, er man greiður yvir so nógv ár seinni. Manningin, við Sámal Petur Petersen, skipara, betur kendur sum Piddi og Hans Jørgen, øðrum stýrimanni, saman við øðrum góðum monnum, elvdu til, at har var gott at vera, so leingi tað vardi. Sjálvandi ætlaði eg mær ikki at standa á dekkinum har so leingi, - aðrar avbjóðingar skuldu til. Men man treivst, og nú eru hesir minniligu úrmælingar, sum eg minnist við virðing, farnir, har man ikki røkkur teimum longur. Sakni tykkum og spyrji meg sjálvan, hví tit fóru í so góðum árum.

Men løturnar, - dagarnir, vikurnar, mánaðarnir og árini, alt tíðarskeiðið tilsamans, vildi eg ikki havt verið fyri uttan. Tað vóru gevandi, nemandi og harðar royndarløtur umborð. Tíðarskeiðið umborð á Venusi í Eysturgrønlandi, undir Føroyum og Íslandi, gjørdu mánaðarnar umborð á danska skúlaskipinum ikki so harðrendar og meiningsleysar, tí eg hevði fingið eina serliga upplæring umborð á Venusi hjá tykkum báðum, Pidda og Hans Jørgen. Ein skúli, ið teir, eftir førimuni settu okkum óroyndu inn í. Tað fekk eg at kenna seinni sum serligan førning á lívsleiðini, ið eg ikki tá var serliga nógv vandaður um, men nú haldi, var øðrvísi og neyðug.

Vit sóust av og á og vistu altíð av hvørjum øðrum, hóast leiðirnar nú gingu í hvør sína ætt. Vit riggaðu ikki av, tí vit høvdu onga ábending um, hvussu vorðið fór at vera við avmálda dagatalinum, tíbetur, haldi eg.

Vildi fylgt tær tann dagin, tú vart borin út í kirkjugarðin í Sandavági. Tað bar tíverri ikki til. Men kortini fylgdi eg við tykkum og frætti okkurt, Theodor Eli bar fram á kórgáttini í kirkjuni í Sandavági. Nancy og børnunum sendi eg bestu ynski um jólini og alt gott í árinum, sum kemur. Hvíl í friði og takk fyri løturnar, ið tíðin fór við.

**Páll N. Slættanes**
**Sønderborg**



# MERKISDAGAR

**Gullbrúdleyp**
12. jan. hava hjúnini Magdalena og Jákup Martin Joensen í Oyndarfirði gullbrúlleyp. Dagurin verður hildin í skúlanum í Oyndarfirði tann 16. jan. kl. 19. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Silvurbrúdleyp**
Týsdagin 29. des. halda vit silvurbrúdleyp. Vælkomst verður í Skálanum í Klaksvík frá kl. 16. Julianna og Olivur Thomsen.

**70 ára føðingardagur**
Tann 28. des. verður Eyðbjørn Lervig Leirvík 70 ár. Føðingardagurin verður hildin sunnudagin 27. des. í bowlinghøllini í Leirvík frá kl. 17.

**80 ára føðingardagur**
30. des. verður Asta Larsen Tvøroyri 80 ár. Dagurin verður hildin saman við familjuni.

**85 ára føðingardagur**
Sunnudagin 3. jan. verður Steingrim Joensen, Argjaboðagøta 32, Argir, 85 ár. Dagurin verður hildin í AB-húsinum við fótbóltsvøllin á Argjum sunnudagin 3. jan frá kl. 13-17. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Brúdleyp**
Mánadagin 28. des. kl. 15 giftast í Christianskirkjuni Birna Arge og Poul Jóhannes K. Joensen. Veitslan verður fyri innbodnum á Klaksvíkar Sjómansheimið kl. 19.

**Brúdleyp**
Mikudagin 30. des. giftast Anna Mohr Joensen úr Kollafirði og Bjørn Holm úr Djúpadali. Vígslan verður í Dómkirkjuni kl. 17. Brúdleypið verður fyri innbodnum á Hotel Føroyum aftan á vígsluna.

**Brúdleyp**
Nýggjársdag 1 jan. giftast Svavar Torbjørnson Joensen og Tórun Miðberg. Vígslan verður í Kollafjarðar kirkju kl. 14. Opið hús verður í bygdarhúsinum í Kollafirði frá kl. 15.30-20.30. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Brúdleyp**
Fríggjadagin 1. jan. giftast í Fuglafjarðar kirkju kl. 15 Randi Sólsker og Sigfríður Abrahamsen, Eiði. Opið hús verður heima (Gerðisvegur 3) kl. 20 har øll eru vælkomin.

**Brúdleyp**
Leygardagin 2. jan. giftast í Sjóvar kirkju Anna Petersen av Strondum og Pauli G. Hansen av Skála. Vælkomst verður í bygdarhúsinum í Leirvík kl. 18. Tey, ið ynskja at gleða okkum við at koma, verða vinarliga biðin um at siga frá á tlf. 591486/447257 (Anna) ella 594323/441323 (Pauli) innan 15. des.

**Brúdleyp**
Leygardagin 2. jan. kl. 13 giftast í Vesturkirkjuni Rebekka Consuelo Nilssen úr Tórshavn og Símun Petur Eið av Hellunum. Veitsla verður í HB-húsinum kl. 18.30 fyri innbodnum.

## Dagurin

**21. desember.**
**Tummasarmessa.**
Lærusveinurin sum fekk navnið hin vantrúni. Halgisøgan sigur, at hann boðaði evangeliið í Indiu, og har er í hvussu so er eitt tummasarkirkjulið, sum hann sigst at hava stovnað.

*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008)*